# Arbeiðsfólk hjá Løgtinginum breyt halgidagslógina

**Tað fall kirkjugangarunum í Havnar kirkju tungt fyri bróstið sunnumorgunin, tá tey komu úr kirkju, at síggja mann smíða við nýggja skrivstovubygningin hjá Løgtinginum**

HALGIDAGSLÓGIN
*Solby A. Eliasen*



*Tað fall kirkjugangarum í Havnar kirkju tungt fyri bróstið, at síggja mann til arbeiðis i kirkjutíð sunnumorgunin*

Tá kirkjufólkið kom aftur frá gudstænastu úr Havnar kirkju sunnumorgunin, sást maður til arbeiðis við nýggja skrivstovubygningin hjá Føroya Løgtingi. Sum vera man, undraðust fleiri stórliga, tí ikki er vanligt, at tað verður arbeitt í kirkjutíð í Føroyum. Og harafturat er tað sambært halgidagslógini ikki loyvt. Men eyðsæð var tað so onkur, sum annaðhvørt ikki hevur virðing fyri lógini ella ikki visti av henni.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur við Sosialin, at hann ikki visti av hesum, fyrr enn Sosialurin gjørdi vart við tað, men at tað undir ongum umstøðum kann góðtakast, at tað verður arbeitt sunnudag. Hann sigur, at tað frá løgtingsins síðu ongantíð hevur verið nakar slingur í valsinum hesum viðvíkjandi.

– Tað skal ikki verða arbeitt sunnudag, sjálvandi kunnu viss undantøk gerast, men hetta má sigast at vera eitt vanligt byggimál, so tað kann ikki góðtakast, at tað verður arbeitt í kirkjutíð, sigur Edmund Joensen.

Hann var, sum sagt, ikki greiður yvir hetta, men hann sigur, at tað frá Løgtingsins síðu eru strangir ordrar um at halda seg til galdandi lógir og reglar hesum viðvíkjandi.

Edmund sigur, at hann fer nú at fregnast um, hvat hetta er fyri nakað, og hví tað er komið fyri.

Regluligir byggifundir eru við fyritøkuna, sum hevur verkætlanina um hendi, og har fer løgtingsformaðurin so at gera vart við hetta og royna at finna út av, hví fólk var til arbeiðis ein sunnudag í kirkjutíð.

### Øgiligt mistak

Tað er byggifyritøkan Articon, sum hevur byggimálið um hendi. Stjórin, Jón Danielsen, sigur, at tað er ein føst regla hjá fyritøkuni, at ongin arbeiðir sunnudag. Men hann heldur, at tað er ein møguleiki fyri, at tað hevur verið ein danskur arbeiðstakari, sum hevur verið til arbeiðis henda sunnumorgunin.

Stjórin á Articon sigur, at hann sjálvandi fer at kanna at vita, um tað er so. Um so er, fer hann at kunna viðkomandi um halgidagslógina í Føroyum.

– Hatta góðtaka vit ikki, og tað er púra vist, at hatta fer ikki at endurtaka seg, sigur Jón Danielsen. Hann leggur afturat, at tað kann ikki vera uppgávan hjá Articon at halda vakt við bygningin sunnudagar og syrgja fyri, at tað ikki verður arbeitt.

– Sunnumorgnar eru vit heima hjá familjunum, tá standa vit ikki vakt við bygningin, men tað kann absolutt ikki góðtakast, at tað verður arbeitt í kirkjutíð ein sunnudag. Tað hava vit aldrin praktiserað her á Articon, sigur Jón Danielsen, sum heldur hetta vera eitt øgiligt og harmiligt mistak.

Men tað er ikki bara arbeiðsfólk hjá Føroya Løgtingi, sum gongur ímóti halgidagslógini. Sunnudagin sóust eisini fólk hjá Tórshavnar kommunu til arbeiðis við nýggju atløgubryggjuna til Norrønu, sum kemur til landið hósdagin seinnapartin.

Heðin Mortensen, virkandi borgarstjóri, sigur, at tað hevur ongantíð verið politikkurin hjá Tórshavnar kommunu at lata fólk arbeiða sunnudag, men í hesum førinum var eitt undantak, tí her er talan um eitt arbeiði, sum skal verða liðugt til ávísa tíð.

– Atløgubryggjan skal verða liðug hósdagin, og arbeiddu fólk sunnudagin, tí vit eru í tíðarneyð, sigur Heðin Mortensen. Hann leggur tó afturat, at tað varð ikki arbeitt í kirkjutíð.



*Sum Sosialurin skilir, so kann tað vera, at talan er um ein danskan arbeiðstakara, sum var til arbeiðis*



*Sunnumorgunin í kirkjutíð var maður til arbeiðis við nýggja skrivstovubygningin hjá Føroya Løgtingi*

# Páskabryggið frá Føroya Bjór best

**Herfyri varð skipað fyri ølsmakking í danska felagsskapinum Selskab for Vestjysk Ølkultur, og páskabryggið frá Føroya Bjór varð best umtókt í sínum klassa**

ØLSMAKKING
*Solby A. Eliasen*



*Páskabryggið frá Føroya Bjór var tað mett at vera tað besta í sínum klassa til eina ølsmakkiroynd í Vesturjútlandi herfyri*

Eini 100 fólk vóru við til smakkiroyndirnar, sum vórðu hildnar í sambandi við aðalfundin hjá felagsskapinum. Smakkiroyndirnar vóru sokallaðar blindsmakkiroyndir. Tað vil siga, at fólkini ikki vistu, hvat slag tað var, sum tey valdu at vera best. Men tá avtornaði høvdu tey valt Páskabryggið frá Føroya Bjór at vera tað besta í klassa II, sum er gull-klassin. Ølið verður klassað eftir styrki.

Føroya Bjór var somuleiðis nummar eitt til jólasmakkiroyndirnar hjá sama felagsskapi, tá skipað varð fyri jólabryggjsmakkiroyndum í november í fjør.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, fegnast um góða úrslitið hjá Páskabrygginum. Hann sigur, at tað staðfestir, at páskabryggið er gott, og at onnur eisini halda tað.

– Tað, at páskabryggið eisini verður dømt at vera best í eini smakkiroynd í Danmark, er prógv um, at tað ikki bara eru tey lokalu, sum halda tað vera gott, heldur stjórin á Føroya Bjór, Einar Waag.

Páskabryggið varð valt fram um átta onnur sløg í sama klassa.

Tað er gott PR fyri Føroya Bjór aðrastaðni, at teirra øl fær viðurkenning, tí tað verður kunngjørt fyri almenninginum. Til dømis er tað lagt út á fleiri heimasíður á netinum.

Einar Waag sigur, at tað eru nógv tílík feløg í Danmark, sum skipa fyri ølsmakking. Hesi feløg royna allatíðina at kanna og vita, um tey smærri bryggjaríini ikki eru líka góð, sum tey stóru.

Einar Waag sigur, at sjálvandi eru tey fegin um úrslitið á Føroya Bjór, tí her verður ølið smakkað av fólki, sum samstundis smakka onnur sløg, og tá tað tá verður mett at vera best, má tað kunna sigast at vera eftirfarandi.



# Byggja eldrasambýli á Toftum

**- Sambært byggiætlanini stendur heimið, sum fer at hava 16 búpláss, liðugt um eitt ár, sigur Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður í Nes kommunu**

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*



*Nógv bygging fer fram innanfyri Føroya Banka á Toftum í hesum døgum. Fremra grundin á myndini er nýggja húsið, Nebo, hjá brøðrasamkomuni í Nes kommunu; seinna og norðrara grundin er eldrasambýlið, sum Nes kommuna letur byggja.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Innanfyri Føroya Banka á Toftum er stórt byggivirksemi í løtuni.

Fyrra grundin, sum er stoypt upp, er nýggja húsið hjá brøðrasamkomuni, Nebo í Nes kommunu; seinna og norðrara grundin er eldrasambýlið, sum Nes kommuna letur byggja.

Tað er byggifelagið, KBH á Toftum, sum stendur fyri stoypingini og timburarbeiðinum av eldrasambýlinum.

### 16 búfólk

Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður í Nes kommunu, sigur, at eldrasambýlið verður bygt upp í tveimum hæddum við lágari reising.

- Sambært byggiætlanini stendur sambýlið klárt at taka í nýtslu um hesa tíðina komandi ár, og pláss verður fyri 16 fólkum.

Hon sigur, at øll arbeiðini í sambandi við byggingina eru boðin út, og avgjørt er, hvør kemur at taka sær ymisku uppgávunum.

- Avgjørt er, at KBH skal gera bygningin lidnan; síðan hava vit aðrar arbeiðstakarar, sum skulu syrgja fyri el, hita, saniteti, málaraarbeiði og gólválegging.

Marjun sigur, at pláss er fyri at útbyggja sambýlið, um tørvur skuldi verið á tí í framtíðini.

- Men í hesum umfarinum konsentrera vit okkum um at fáa verandi projekt frá hondini, sigur hon.

Nes kommuna er við í Røktar-og ellisheiminum í Runavík, har teir "tyngru" brúkararnir eru.

- Vit eru eisini við í teirri útbygging, sum fer fram í Runavík, leggur hon aftrat.

### 13 milj. krónur

Sambýlið í Nes kommunu fer at kosta einar 13 milj. krónur, og tað er nakað meira, enn upprunaliga mett.

Bygdaráðsformaðurin sigur, at dýrkingin stendst av ymiskum hækkingum, eitt nú lønarhækkingum, men hon heldur kortini, at prísurin er innan rímiligar kamar.

Tað er Fuglø Arkitektar í Klaksvík, sum hava teknað sambýlið í Nes kommunu, og felagið hevur eisini eftirlitið við byggingini.

Marjun Gaardbo heldur, at eldrasambýlið er væl plaserað innanfyri Føroya Banka, og útsýnið yvir havnalagið og fjørðin er gott.

# Útstykkingin á Gadd undir landi

**Bygdaráðsformaðurin í Nes kommunu væntar, at útstykkingin fer at nøkta tann tørv, sum er á grundøkjum í løtuni**

ÚTSTYKKING
*Vilmund Jacobsen*

Í løtuni er ikki so nógv sethúsabygging í Nes kommunu. Onkur hús standa í gerð, og kommunan liggur inn við nøkrum umsóknum um byggiøki.

### Nøktar tørvin

Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður, sigur, at útstykkingin, sum fer fram innanfyri húsini á Gadd, er undir landi.

- Vit vænta, at grundøkini, sum eru við í hesi ætlan, verða klár at selja um heilt stutta tíð.

- Kommunan liggur inni við nøkrum umsóknum um byggiøki, men hesar eru ikki so nógvar í tali.

Marjun væntar tí, at útstykkingin, sum nú er undir landi, fer at nøkta tann tørv, sum er á grundøkjum í løtuni.

- Tey grundøkir, sum í fyrsta lagi verða klár, eru tey, sum liggja fram við nýggja vegnum, ið er bygdur av Gadd og heim í Heygarnar.

### Næsta stigið

Bygdaráðsformaðurin sigur, at nýggja byggiætlanin røkkur av Gadd og nakað heim um húsini í Forna.

- Hvat næsta stigið verður, tá ið útstykkjast skal av nýggum, er ikki greitt enn. Men vit fara at umrøða, hvussu farast skal víðari við byggingini, sigur Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður í Nes kommunu.

# 4000-5000 fólk á bústevnu



*Neyvari metingar siga, at eini 4000-5000 fólk vitjaðu á bústevnuni, Hús og Innbúgv 2003, sum var í Ítróttarhøllini í Runavík seinasta vikuskiftið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

BÚSTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*

Í blaðnum í gjár høvdu vit grein um bústevnuna, Hús og Innbúgv 2003, sum var í Ítróttarhøllini í Runavík seinasta vikuskiftið.

Í samrøðuni, segði ein av stigtakarunum, Hans Petur Ellingsgaard, at ein eftirmeting skuldi gerast, áðrenn sigast kundi endaliga, hvussu tiltakið hevði vignast.

Hann helt tó, at bústevnan hevði eydnast til fulnar. Framsýnararnir, hann hevði tosað við, vóru væl nøgdir, og karmarnir uttan um bústevnuna vóru góðir.

Hans Petur segði, at nógv fólk vitjaðu, serliga leygardagin og sunnudagin, tá ið veðrið var so óføra gott.

Hann dugdi tó ikki at siga neyvt, hvussu nógv fólk høvdu verið inni á gólvinum stevnudagarnar.

Nakað eftir, at vit høvdu gjørt samrøðuna, og greinin var farin í blaðið, ringdi Hans Petur Ellingsgaard aftur og segði, at talið av vitjandi lá onkustaðni millum 4000 og 5000.

Hetta er eitt stórt tal á eini sølustevnu.